RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

# HVAT ER FERÐSLUPOLITIKKUR?

**FERÐSLUPOLITIKKUR LÝSIR STUTT OG GREITT, HVAT SKÚLIN GER FYRI AT FYRIREIKA NÆMINGARNAR AT FERÐAST TRYGT Í FERÐSLUNI.**

---

## Eitt gott amboð

Ferðslupolitikkur nýtist ikki at vera eitt umfatandi skjal. Tað kann eisini bert vera 10 góðar reglur, sum verða fylgdar.

Ferðslupolitikkur leggur dent á ferðsluundirvísingina, ferðsluna kring skúlan, ferðsluvanar hjá børnum og vaksnum og á samstarv millum foreldur, skúla, kommunu og politi. Ferðslupolitikkurin í einum skúla er hent amboð, tá ið arbeitt verður við atburðinum hjá næmingum í ferðsluni. Hann kann vera við til at gera samstarvið millum allar partar miðvísari.

Skúlin hevur sjálvur ábyrgd av at gera og halda viðlíka ferðslupolitikkin. Hava tit spurningar í sambandi við ferðslupolitikkin ber til at venda sær til Ferðslutrygd á rff@rff.fo.



Tilfar brúkt við loyvi frá: RÅDET FOR SIKKER TRAFIK




# Fýra øki

Avbjóðingarnar kunnu vera ymiskar úti í skúlunum. Morgunruðuleiki við skúlan, møguliga kenna næmingar og foreldur seg ótrygg við skúlaleiðina, møguliga verður undirvíst ov lítið í ferðslu o.s.fr.

Sama hvat útgangsstøðið er, er skilagott at hugsa breitt frá byrjan. Ráðið fyri Ferðslutrygd mælir til, at ferðslupolitikkurin altíð leggur dent á hesi fýra evni:

- **Ávegis**
- **Undirvísing**
- **Fyrimyndir**
- **Samstarv**

---

# Seks stig til at gera ferðslupolitikk

**Tá farið verður í holt við at arbeiða við ferðslupolitikki, kann vera torført at meta um, hvar skilabest er at byrja.**

Hesi seks stigini eru amboð, tit kunnu nýta til at hjálpa tykkum ávegis í arbeiðinum við ferðslupolitikki.



1. **Fyrireiking** Tit taka stig til at gera ein ferðslupolitikk. Tit hava allar viðkomandi partar við og koma ásamt um, hvussu arbeiðið skal skipast.
2. **Greining og yvirlit** Tit kanna og meta um, hvat er gjørt áður. Hvat riggar, hvat riggar ikki, hvørjar avbjóðingar eru, sum ferðslupolitikkurin eigur at hava við.

3. **Mál** Uppgávan at arbeiða við ferðslupolitikki skal ikki vera ov umfatandi. Tí er skilagott, at tit seta tykkum nøkur mál. Málini skulu vera yvirskipað, men eisini lutmál eru týðandi í ferðslupolitikki.
4. **Raðfesting og virkisætlan** Til ber ikki at gera alt í senn. Raðfestið tí ynski tykkara og gerið eina tíðarætlan. Við hesum sum útgangsstøði kunnu tit eftir tørni greina, hvussu tit ætla at loysa einstøku trupulleikarnar.
5. **Fremjing** Skrivið niður, hvør ger hvat, umframt nær tað verður gjørt fyri at tryggja tykkum, at arbeiðið ikki dettur niðurfyri. Tá ferðslupolitikkurin er orðaður, eiga tit at varpa ljós á hann, soleiðis at bæði foreldur, næmingar og lærarar kenna hann. Leggið eisini tilfarið á heimasíðu skúlans.
6. **Framhaldsviðgerð** Neyðugt er javnan at endurskoða arbeiðið, t.d. við einum árligum fundi.

# Innihald í ferðslupolitikki

**Ferðslupolitikkurin er eitt livandi skjal, sum altíð kann broytast.**

## Evni í ferðslupolitikki

Sama hvat evni er mest umráðandi at umrøða á júst tykkara skúla, er týdningarmikið at hava øll fýra evni, sum eru nevnd niðanfyri, við:

1. **Ávegis** Ferðslupolitikkurin kann áseta, hvussu næmingar, foreldur og lærarar ferðast í ferðsluni kring skúlan. Hesin parturin snýr seg um skúlaleiðina, til gongu, á súkklu, við bili ella bussi og túrar við skúlanum.
2. **Undirvísing** Ferðslupolitikkurin kann gera innihaldið og tilfarið í ferðsluundirvísingini ítøkiligt og nágreina, hvussu undirvísingin verður skipað gjøgnum skúlaskeiðið hjá næmingunum.
3. **Fyrimyndir** Vaksin eru fyrimyndir hjá børnum og ungum í ferðsluni. Ferðslupolitikkurin kann áseta leiðreglur fyri góðu fyrimyndina.



4. **Samstarv** Ferðslupolitikkurin kann vera við til at skipa samstarvið um trygga skúlaferðslu. Nógvir samstarvspartar eru viðkomandi, m.a. kommuna, grannar og løgreglan.



---

# Ger ferðslupolitikkin livandi

### Tá ið ferðslupolitikkurin er liðugur, er umráðandi, at hann gerst livandi.

Ferðslupolitikkurin eigur at ávirka virki skúlans. Soleiðis er bert, um allir viðkomandi partar duga at síggja virðið í honum. Tí er skilagott at hava nøkur afturvendandi tiltøk, sum minna øll á, at ferðslupolitikkurin verður nýttur í gerandisdegnum.

**Tit kunnu t.d.:**

- Hava eina afturvendandi evnisviku ella evnisdag um ferðslu
- Hava eftirlitsfólk úti um morgnarnar at kanna, um ferðslupolitikkurin verður hildin
- Taka ferðslupolitikkin upp til viðgerðar á einum árligum skúlastýrisfundi
- Geva børnunum eitt bræv heim við til foreldrini um ábyrgd teirra við skúlabyrjan
- Leggja ferðslupolitikkin á heimasíðu skúlans
- Greiða frá ferðslupolitikkinum á lærarafundum, í flokkunum og á foreldrafundum

---